# Lítlavík karmur um grafikk

LIST

*Ingrid Bjarnastein*

Smiðjan í Lítluvík letur aftaná flaggdagshaldið á Vaglinum upp framsýning. Tað er Tórshavnar Listaskúli, sum heldur til í Kongagøtu 7, sum hevur framsýningina. Tórshavnar Listaskúli hevur millum annað frálæru í grafikki.

Skúlaárið 2001/2002 hava 20 næmingar gingið til grafikk, og 14 teirra sýna fram listarverk í Smiðjuni, og harav verða eisini nøkur listarverk seld. Hetta er aðru ferð Listaskúlin hevur framsýning í Smiðjuni í Lítluvík flaggdagin.

Tey, ið hava hug at leita sær oman í Lítluvík, fáa at síggja steinprent, etjingar, turrnál, linoleum og fotogravura. Lærarin, ið hevur undirvíst teir 20 næmingarnar er Jóna Rasmussen, og hon hevur í fleiri ár undirvíst á skúlanum.

Men framsýningin er eisini opin aðrar dagar. Flaggdagin er opið frá 16 – 18, Dýra Biðidag, leygardagin og sunnudagin er framsýningin opin frá klokkan 14-18.





*Flaggdagin letur Tórshavnar Listaskúli upp framsýning í grafikki í Smiðjuni í Lítluvík*

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og suðri, skýggjað og sirm. Um kvøldið økist vindurin nakað og tað fer at regna. Um náttina strúkur í vindi og tað slítur í. Hitin økist til millum 8 og 11 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi. Ælaveður, men eisini onkrir sólglottar. Út á dagin minkandi niður í andøvsgul. Hitin millum 5 og 8 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Stívt andøvsgul av ymsum ættum. Skýggjað og regn ella ælaveður. Hitin umleið 6 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk millum vestan og norðan. Ælaveður, men eisini onkrir sólglottar. Hitin umleið 5 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷7 |
| Nuuk | ÷2 |
| Qaqortoq | 8 |
| Ammassalik | 0 |
| Saint John's | 2 |
| Halifax | 6 |
| Reykjavík | 7 |
| Seyðisfjørður | 4 |
| Tórshavn | 9 |
| Lerwick | 10 |
| Aberdeen | 14 |
| London | 20 |
| Tromsø | 6 |
| Bergen | 8 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 17 |
| Keypmannah. | 13 |
| Helsinki | 13 |
| Moskva | 14 |
| Berlin | 15 |
| Warzawa | 16 |
| Kiev | 13 |
| Bukarest | 13 |
| Paris | 20 |
| Madrid | 19 |
| Róm | 19 |
| Malorca | 22 |
| Athen | – |
| Malta | 17 |
| Tunis | 16 |
| Beijing | 15 |
| New Dehli | 36 |
| Bangkok | 36 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 21 |
| New York | 9 |
| Miami | 27 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 33 |
| La Paz | 6 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 13 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst við Ísland fer í ein landnyrðing og lýggj luft rekur inn yvir Føroyar sunnaneftir, men hósnáttina kemur eitt brúgvalag við kaldari luft og ælingi at liggja við Føroyar.



Fríggjadagin fer eitt lágtrýst at dýpast við Føroyar, og liggur í vikuskiftinum eystan fyri oyggjarnar og hevur væl av vindi og regni við sær.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 22/04 kl. 06[00]– 23/04 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 8,6°
Minsti hiti máldur í apríl: ÷9,9° Mesti hiti máldur í apríl: 15,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 4,0 mm – mált frá 22/04 kl. 06[00]– 23/04 kl. 06[00]
Avfallið higartil í apríl: 45,5 mm












## VESTFALLSKYRRINDI

20. apríl: Fyrra kvarter
25. apríl: Mánin næstur jørðini
27. apríl: Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2002

| | Suðuroyar—/ Vágafirði | | Skúvoyar—/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna—sundi | | Mykines—firði | | Nólsoyar—firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar—/ Svínoyarfirði | | Hvanna—sundi | | Fugloyar—firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 24. apr | 05.06 | 17.29 | 04.06 | 16.29 | 04.21 | 16.44 | 07.06 | 19.29 | 08.06 | 20.29 | 03.21 | 15.44 | 02.21 | 14.44 | 05.21 | 17.44 | 06.21 | 18.44 | 04.51 | 17.14 | 06.06 | 18.29 |
| 25. apr | 05.52 | 18.15 | 04.52 | 17.15 | 05.07 | 17.30 | 07.52 | 20.15 | 08.52 | 21.15 | 04.07 | 16.30 | 03.07 | 15.30 | 06.07 | 18.30 | 07.07 | 19.30 | 05.37 | 18.00 | 06.52 | 19.15 |
| 26. apr | 06.38 | 19.03 | 05.38 | 18.03 | 05.53 | 18.18 | 08.38 | 21.03 | 09.38 | 22.03 | 04.53 | 17.18 | 03.53 | 16.18 | 06.53 | 19.18 | 07.53 | 20.18 | 06.23 | 18.48 | 07.38 | 20.03 |
| 27. apr | 07.28 | 19.54 | 06.28 | 18.54 | 06.43 | 19.09 | 09.28 | 21.54 | 10.28 | 22.54 | 05.43 | 18.09 | 04.43 | 17.09 | 07.43 | 20.09 | 08.43 | 21.09 | 07.13 | 19.39 | 08.28 | 20.54 |

5 707265 100036 >